## Dystir um páskirnar

Kappingin um løgmanssteypið

Bólkur 1

| Dagf | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 08.04 | B36-NSÍ | Suni Johansen |
| 08.04 | KÍ-FSV | Niklas á Líðarenda |
| 12.04 | NSÍ-KÍ | Petur Skarðenni |
| 12.04 | FSV-B36 | Páll Augustinussen |

Bólkur 2

| Dagf | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 08.04 | ÍF-B68 | Dagfinn Olsen |
| 08.04 | GÍ-TB | Birgir Sondum |
| 12.04 | B68-TB | Lassin Isaksen |
| 12.04 | GÍ-ÍF | Eiler Rasmussen |

Bólkur 3

| Dagf | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 08.04 | EB/S-HB | Lassin Isaksen |
| 08.04 | Skála-VB | Oddmar Andreasen |
| 12.04 | HB-Skála | Georg Rasmussen |
| 12.04 | VB-EB/S | Niklas á Líðarenda |

## Bólkaspælið í kappingini um løgmanssteypið

Bólkur 1

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B36 | 3 | 2 - 1 - 0 | 12 | 2 | 10 | 7 |
| 2 | KÍ | 3 | 1 - 2 - 0 | 6 | 4 | 2 | 5 |
| 3 | NSÍ | 3 | 1 - 1 - 1 | 6 | 5 | 1 | 4 |
| 4 | FSV | 3 | 0 - 0 - 3 | 2 | 15 | -13 | 0 |

Bólkur 2

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | GÍ | 3 | 3 - 0 - 0 | 6 | 1 | 5 | 9 |
| 2 | ÍF | 3 | 2 - 0 - 1 | 10 | 4 | 6 | 6 |
| 3 | B68 | 3 | 0 - 1 - 2 | 3 | 7 | -4 | 1 |
| 4 | TB | 3 | 0 - 1 - 2 | 2 | 9 | -7 | 1 |

Bólkur 3

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB | 3 | 2 - 0 - 1 | 8 | 2 | 6 | 6 |
| 2 | HB | 3 | 2 - 0 - 1 | 4 | 6 | -2 | 6 |
| 3 | EB/S | 3 | 1 - 1 - 1 | 6 | 6 | 0 | 4 |
| 4 | Skála | 3 | 0 - 1 - 2 | 2 | 6 | -4 | 1 |

# NSÍ fekk danskt mótstøðulið

Lutakastið til Inter-Toto kappingina lagaði seg heilt væl fyri runavíkingar

Sum nummar fýra í landskappingini í fjør vann NSÍ sær rættin til føroyska Inter-Toto plássið, og nú er eisini greitt, at mótstøðuliðið hjá runavíkingum verður úr Danmark.

Enn er tó ikki greitt, hvat mótstøðuliðið verður, men sum danska superligan sær út í løtuni, bendir nógv á, at tað verður tað niðasta av teimum fýra oddaliðunum, Esbjerg, Brøndby, FCK og OB.

Við heimasíðuna, www.nsi.fo, sigur Jákup Mortensen, formaður í NSÍ, at hann er fegin um lutakastið.

– Eg haldi ikki, at vit kundu fingið eitt stórt betri lutakast, tí við danskari mótstøðu fáa vit ikki tær øgiligu ferðaútreiðslurnar. Og tað hevur týdning, tí tað eru ikki so nógvir pengar í Intertoto Cup-kappingini, sigur formaðurin við heimasíðuna.

**-jm**

# Sannleikin nærkast alsamt

**Tvey umfør í steypakappingini standa á skránni um páskirnar**

LØGMANSSTEYPIÐ

*Jákup Mørk*



*Fuglfirðingar vunnu greitt á TB seinasta umfar, og nú vilja teir kapast við grannarnar úr Gøtu um oddasessin í bólki 2*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

Tað er aloftast um páskirnar, at vinnararnir verða skildir frá taparunum í kappingini um løgmanssteypið, og tó at talan í ár bert er um tvey umfør mótvegis teimm trimum, sum ofta plaga at vera á skránni um hesa tíðina, so er einki at ivast í, at nógvir spurningar fara at verða svaraðir.

### B36 er væl fyri

Í bólki eitt tykist størsti spurningurin í løtuni vera, hvat lið skal fylgja B36 víðari í kappingini. Higartil hevur árstalsfelagið verið heilt væl koyrandi, og tó at teir máttu taka til takkar við javnleiki í Klaksvík, so tykist sessurin í fjórðingsfinaluni longu nú at vera mest sum tryggjaður.

Spurningurin er so, hvørt talan verður um fremsta plássið í bólkinum, sum gevur heimavøll í fjórðingsfinaluni, og eisini tann spurningurin kann partvíst svarast um páskirnar. Her verður málið hjá B36 heilt greitt at fáa fulla úrtøku móti bæði NSÍ og FSV, soleiðis at útgangsstøðið er tryggjað undan seinasta heimadystinum móti KÍ.

Klaksvíkingar fáa helst eisini sítt at síggja til. Ikki minst tá teir annan páskadag vitja við Løkin í Runavík, har teir uttan iva fara at hitta eitt sera væl tendrað NSÍ lið. Skírisdag átti tað í øllum førum ikki at verið tann heilt stóri trupulleikin hjá liðnum, tá teir á heimavølli skul spæla móti FSV.

Runavíkingarnir hava ikki fingið best hugsandi byrjanina í bólkaspælinum, og nógv bendir á, at tað helst skulu í minsta lagi seks stig til afturat, áðrenn teir kunnu bíleggja sær pláss í framhaldinum av kappingini.

### ÍF vil kappast við grannarnar

Í bólki tvey tykist GÍ longu hava sett fulla ferð móti oddasessinum, men enn fáa teir so kapping frá ÍF í hesum.

Skal ÍF tó gera álvara av hesum hóttanum, so skulu teir tó helst vinna báðar sínar dystir um høgtíðina. Skírisdag móti illa sperdu toftamonnunum, sum enn bert hava eitt stig á kontini, og annan páskadag á útivølli móti GÍ, sum nærum av sær sjálvum hevur eitt jarntak á fuglfirðingunum.

Støðan hjá gøtumonnum tykist nakað meira rólig, tó at ein sigur á ÍF helst skal til, um teir við 100% vissu skulu ogna sær oddasessin. Men fáa teir trý stig í heimadystinum móti TB, er eisini av álvara farið at líða hjá teimum.

TB og B68 hava higartil átt botnsessin, og serliga hjá B68 man hetta kennast sum eitt vónbrot. At toftamenn so eisini hava leikt heima móti bæði ÍF og GÍ, ger ikki støðuna lættari, og tí er kravið til teir nú, at teir sum minstakrav skulu hava seks – og allar helst fleiri – stig í seinastu trimum dystunum, um teir ætla sær víðari í kappingini.

### Púrasta opið

Í triðja bólkinum er spenningurin eisini nakað størri, enn tað bendi á undan seinasta umfarinum. Her megnaði VB at seta HB so dyggiliga upp á pláss, og tað blásti aftur bólkin víðopnan.

HB eigur skírisdag trupla uppgávu á Eiði, har EB/Streymur framvegis er væl við í kappingini, samstundis sum VB tá hevur útidyst móti Skála.

Seinna kappingardagin um páskirnar er HB helst favorittur, tá Skála vitjar, meðan VB hevur sama leiklut heima móti EB/Streymi, men nógv bendir tó á, at einki sum helst er avgjørt í hesum bólkinum, fyrr enn seinasti dysturin er leiktur. Ikki minst tí talan tá eisini verður um seinnu uppgerðina millum HB og VB.

# Føroyameistararnir í svimjing hjá ÍSB funnir

**Fyri góðari viku síðani skipaði ÍSB fyri føroyameistarakapping í svimjing. Kappast varð á trimum teinum og í trimum greinum. Svomið var 25 metrar, 50 metrar og 100 metrar. Kappingagreinarnar vóru ryggsvimjiing, bringusvimjing og frísvimjing.**

**-tn**

### FM-kappingin í svimjing hjá ÍSB

**25 m Frí**

Bólkur 2

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Rannvá Falkvard | 0.36,13 |
| 2 | Theodor Esmar Hansen | 0.40,28 |
| 3 | Hans J. Bárá | 0.42,21 |
| 4 | Alma Skarðhamar | 0.56,90 |
| 5 | Tórður í Puntabyrgi | 1.32,82 |

Bólkur 1

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Kristian M. Garðalíð | 0.21,80 |
| 2 | Maureen Garðshmar | 0.27,31 |
| 3 | Tomina Niclassen | 0.40,66 |

**100 m bringu**

Bólkur 1

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Durita Strøm | 1.54,53 |
| 2 | Marjun Niklasdóttir | 2.28,67 |

**50 m frí**

Bólkur 1

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Símun P. Zachariasen | 0.37,16 |
| 2 | Júst í Túni | 0.39,97 |
| 3 | Apolonia Jústesen | 0.40,40 |
| 4 | Rannvá Strøm | 0.43,0 |

Bólkur 2

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Kristian M. Garðalíð | 0.53,65 |
| 2 | Elvin Weihe | 0.53,78 |
| 3 | Osvald Hansen | 1.14,23 |

Bólkur 3

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Tordur í Túni | 0.51,80 |
| 2 | Maureen Garðshamar | 1.05,0 |
| 3 | Ella Eltør | 1.34,19 |

**25 m rygg**

Bólkur 1

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Rannvá Falkvard | 0.40,53 |
| 2 | Hans J. Bárá | 0.58,72 |
| 3 | Theodor Esmar Hansen | 1.13,75 |

**100 m Frí**

Bólkur 1

| | | |
|---|---|---|
| 4 | Durita Strøm | 1.29,91 |
| 5 | Halla Poulsen | 1.51,25 |

**50 m rygg**

Bólkur 2

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Elvin Weihe | 1.08,56 |
| 2 | Osvald Hansen | 1.11,13 |
| 3 | Tordur í Túni | 1.28,75 |

Bólkur 1

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Símun P. Zachariassen | 0.49,06 |
| 2 | Rannvá Strøm | 0.53,53 |
| 3 | Halla Poulsen | 1.05,13 |

**50 m bringa**

Bólkur 1

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Júst í Túni | 0.47,78 |
| 2 | Apolonia Jústesen | 0.53,53 |
| 3 | Marjun Niklasdóttir | 1.06,09 |






## Fíggjarleiðari/ bókhaldari

**Søkt verður eftir fíggjarleiðara/bókhaldara til at byrja skjótast gjørligt.**

Starvið umfatar alt fyrisitingarligt arbeiði innan fíggjarstýring, bókhald og annað vanligt skrivstovuarbeiði.

Viðkomandi skal hava útbúgving og royndir innan fíggjarstýring og bókhald, skal hava góðan teldukunnleika og góð samstarvsevni.

Løn sambært avtalu.

Umsókn við prógvum og upplýsingum um royndir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 19. apríl 2004 og skulu stílast til:

**P/f Demich**
Stiðjagøta 2 · Postboks 378
FO-100 Tórshavn



## Sethúsini Traðagøta 47 til sølu



Um hóskandi boð fæst, eru eini sethús á Argjum við góðum útsýni til sølu.
Grundøki er uml. 500 fermetrar.
Húsini eru í trimum hæddum, miðhædd og kjallarahædd uml. 100 fermetrar og loftið uml. 35 fermetrar.
Kjallaraíbúð: Stova/køkur, tvey kømur, baðirúm og gongd.
Á miðhæddini eru tvær stovur, køkur, baðirúm, kamar og hjúnarúm.
Á loftinum eru tvey kømur og gongd
Byggiár: 1973.

Áhugað kunnu ringja tel. 317087 eftir kl.17.00



**Søkt verður eftir**

## mekanikarum

til at arbeiða uttanlands.

Ring 332422 millum kl. 8.00 og 16.10, ella send ein teldupost til jakup@oilwind.fo fyri at frætta nærri.

OILWIND



## Nordjobb

Nordjobb í Føroyum søkir eftir kamar, íbúðum og húsum í havn í tíðarskeiðnum 1. mai–31. august. Øll tilboð frá einum mánað til alt tíðarskeiðið hava áhuga.

Áhugað kunnu ringja á tlf. 25 74 06.

Nordjobb er ein Norðurlendsk verkætlan fyri ung millum 18 og 26 ár, sum hevur til endamáls at býta um arbeiðskraft í norðurlondum.

Nordjobb er fíggjað av Nordisk Ministerråd og verður umsitið av høvuðsskrivstovuni hjá Norrønafeløgunum í Svøríki.

Fleiri upplýsingar um Nordjobb kunnu fáast á www.nordjobb.net



## Sumbiar Kommuna

Til bingjuplássini í Sumbiar Kommunu verður søkt eftir fólki at byrja skjótast gjørligt.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Sumbiar Kommunu á tlf. 37 03 44.

Umsóknirnar skulu verða Sumbiar Kommunu Í hendi í seinasta lagi 15. apríl 2004.

**Sumbiar Kommuna**
FO-970 Sumba
Telefon 370 344



## VW Golf 2,8



V6, 182 HK, 6,8 sek. til 100 km.
18" sportsfelgur, 17" sportsfelgur á píkadekkum.
Anlegg við subwoofara og forsterkara. Sóltak.
Til sølu, um hóskandi boð fæst.

**Ring 25 82 41**





## Til sølu

Fiat Stilo Sport 1.8, 133 HK
árg. 2002, koyrt 25.000 km, til sølu vegna flyting.

**Tlf. 222355 ella 519927**



## Toyota - dele

brugte og nye

Vi sender hver dag til Færøerne

AABENRAA AUTOGENBRUG
TEL (+45) 74 61 41 10
FAX (+45) 74 61 41 64
www.dkauto.dk · salg@dkauto.dk

Sosialurin 341800



## HANDILSLÆRLINGUR TIL ÍTRÓTTUR Á GLYVRUM

Søkt verður eftir lærlingi til ítróttarhandil okkara á Glyvrum at byrja skjótast tilber.
Starvið er fjølbroytt, spennandi og áhugavert fyri tann ið dámar væl at umgangast viðskiftafólk.
Tað er eisini møguleiki fyri at luttaka á ítróttarmessu í Danmark.

Lærutíðin við HH er 2 ár, og við FHS 3 ár. Í hesum tíðarskeiðnum skal næmingurin á skúla í Danmark 3 ferðir.

Vit vænta at tú ert fryntlig/ur, hevur góð samstarvsevnir, dugir væl at umgangast fólk og ikki bangin fyri at taka eina eyka hond í tá á stendur

Um tú ert tann rætti kunnu við bjóða tær eina spennandi lærutíð við nógvum avbjóðingum, samstundis sum møguleiki er fyri at halda fram í fyritøkuni eftir lokna lærutíð

Umsóknir við viðmælum verða at senda til:

P/f Thomas Dam Ítróttur
Postmoga 268
FO-110 Tórshavn

Sosialurin 341800

**P/F THOMAS DAM**
ÍTRÓTTUR • N. Finsensgøta 5 • Postsmoga 268 • 110 Tórshavn
Tel. 355 300 • E-mail: sportthd@post.olivant.fo



## Frítíðarskúlin á Oyrarbakka

Søkt verður eftir hjálparfólki at byrja skjótast gjørligt.

Starvið er fyribils fram til summarfrítíðina 2004.

Á frítíðarskúlanum, sum er fyri børn í Norðskála-Oyrarskúla. 1., 2. og 3. flokki, eru 16 børn frá kl. 11.30 til kl. 17.00.

Løn sambært sáttmála Pedagogfelagið/KAF. Arbeiðstíðin er frá 11.30-17.00.

Umsókn skal vera Sunda kommunu í hendi seinast týsdagin 20. apríl 2004.

Hava tygum spurningar eru tygum vælkomin at ringja til kommunuskrivstovuna.

**Sunda kommuna**
460 Norðskála
tlf. 422113 · fax 422575
E-mail: sundakom@post.olivant.fo